**Klaksvíkar sjúkrahús og Heilsumálaráðið**

# Mál- og avrikssáttmáli

Januar 2015

**Mál- og avrikssáttmáli fyri 2015**

**Hesin mál- og avrikssáttmáli er millum Klaksvíkar sjúkrahús og Heilsumálaráðið**

Sáttmálin byggir á tey tøl og úrslit hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi, ið vit kenna ídag. Mál og avrik verða tikin við í tann mun vit meta at tað er gjørligt at gjøgnumføra hesi mál, ella har møguligt er at røkka málinum. Stutt sagt, sáttmálin skal vera realistiskur og tað skal vera møguligt at staðfesta um mál eru rokkin.

Sum fyrimynd fyri aðrar stovnar, ynskir Klaksvíkar Sjúkrahús, eisini framyvir at,

- slóða fyri, ganga nýggjar leiðir og vísa á møguleikar innan heilsuøkið
- hava nøgd viðskiftafólk
- hava nøgd starvsfólk

**Misjón:** - at vera ein stovnur, ið sær til, at sjúklingurin fær best møguliga hjálp og ráðgeving á stovninum sjálvum, men at vit eisini kenna okkara ábyrgd, um sjúklingurin verður sendur aðrastaðir til viðgerðar.

**Visjón:** - at liva upp til okkara umdømi har sjúklingar, starvsfólk og onnur viðskiftafólk, framhaldandi eru nøgd við okkara avrik. Eitt avrik, ið skal avspegla ein starvsfólkabólk við høgum fakligum førleika, empati og virðing. Dygd og áræði skal eyðkenna starvsfólkaliðið.

**Fyritreyt og fokus:** Skulu málini og visjónirnar røkkast, er neyðugt at vit áhaldandi fokusera á neyðugar broytingar, betraðar sjúklingagongdir og betur samskifti við sjúklingar og avvarðandi, t.d. við implementering av kontaktpersónaskipan. Hetta krevur so aftur, at útbúgvingarstøðið hjá starvsfólkunum verður uppstigað, og at førleikamenning sum heild er í fokus.

**Fokusøki 2015**

- **Trygd og Dygd**
- **Virksemi uttanlands**
- **Flyta virksemi uttanlands til Føroyar**

**Játtanin (ætlanin) hjá Klaksvíkar sjúkrahúsið er umleið 65,0 mió. kr. í 2015.**

| ***Mál og átøk 2015*** | ***Arbeiðsháttur*** | ***Tíðarætlan*** | ***Ábyrgd*** |
|---|---|---|---|
| | | | |
| Flyta virksemi uttanlands til Føroyar Endurvenjing<br><br>Urologi | Seta á skrá uppskot til víðari kjak um heimtøku av viðgerð av heilaskaðum, t.e. stovnan av uppvenjingarmiðstøð við støði í t.d. Vejlefjord neurocenter.<br><br>Fremja ætlaðu broytingina innan urologi umframt byrja við nýrasteinsknúsing í FO | 2015 og framyvir<br><br>2015 | KS lýsir málið<br><br>KS |
| Trygd og Dygd Mál: 2016-17 | Arbeiða víðari við settu bólkunum í tøttum samskifti við hini bæði sjúkrahúsini.<br><br>Fyrimyndin er Den Danske Kvalitetsmodel. | 2015 og framyvir | KS |
| Virksemi uttanlands (dagførd nýtsla og tøtt budgetstýring) | Saman við hinum sjúkrahússtjórunum + fyrisitingini av økinum, at skapa tætt samband við fyrisitingarnar í DK og aðrastaðir. | 2015 | KS/LS/SS og uttanlandsstænastan. |
| Grannskoðara viðmerkingar<br><br>KT-audit | Dagføra roknskaparreglugerð v.m.<br>KT-trygd, THS-log (ætlan) | 2015 | KS<br><br>KS/THS-toymið |
| Norðoya Bú- og Heimatænasta (NBH) | Tíðliga í 2015 at fáa lidna avtalu við NBH viðv. leigu av parti av Norðoya Røktarheimi (framhald frá 2014) | 2015 | KS / HMR og NBH |

**Klaksvíkar Sjúkrahús hevur hesi ítøkuligu mál fyri ymisk lyklatøl í 2015:**

| *Virksemi* | *2013* | *2014 ætlan* | *2014 væntað* | *2015 ætlan* |
|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 1.593 | 1.000 | 1.300 | ***1.500*** |
| Skurðviðgerðir | 707 | 400 | 600 | ***650*** |
| Skaðast., eftirviðg., kir. og med. ambulatoriir | 7.770 | 7.800 | 11.600 | ***11.000*** |
| Røngtenkanningar | 5.251 | 5.500 | 5.500 | ***5.500*** |
| Rannsóknarstovukanningar | 170.000 | 170.000 | 170.000 | ***170.000*** |
| Fysiurgiskar viðgerðir | 3.320 | 5.000 | 4.500 | ***5.000*** |

| ***Onnur mál og átøk í 2015*** | ***Arbeiðsháttur*** | ***Tíðarætlan*** | ***Ábyrgd*** |
|---|---|---|---|
| Byggimál (OP + M) | Ístandger av parti av OP-gongd og fyrrv. Deild M | 2015 | HMR / KS /Landsverk |
| Viðlíkahaldsætlan | Samstarv við Landsverk | 2015 og framyvir | KS / Landsverk |
| Betur hagtøl | THS | 2015 og framyvir | KS / ths-toymið |
| Neyv fíggjarstýring | Sundurgreining í smálutir (deildir/starvsfólk) | 2015 og annars leypandi framyvir | KS |
| Samstarvsmøguleikar innan heilsuverkið | Samstarvsavtala / stjórafundir | Framhald av verandi arbeiði við samstarv um kirurgi | KS / LS / SS / HMR |

**Sáttmálaskeið**

Sáttmálin kemur í gildi 1. januar 2015 og er galdandi fyri 2015.

Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsumálaráðnum á heystið 2015.

Klaksvík 25. mars 2015

**Klaksvíkar Sjúkrahús** **Heilsumálaráðið**

Heri Ellingsgaard, sjúkrahússtjóri

Turid Arge, aðalstjóri